# SUMMARTÓNAR 2021

***Felagið Føroysk Tónaskøld (FFT) skipar fyri 30. ferð***

Vit heita á tykkum um at koma við hugskotum. FFT vil fegin hava at tónleikarar í Føroyum luttaka. Tí skriva vit til tykkum og vit seta eisini eina vegleiðing saman:

**Mannagongd fyri luttøku á Summartónum 2021**

Vitjandi tónleikarar, sum skuldi spælt á Summartónum 2020 eru flestøll sett á skránni fyri 2021. Tí er ikki pláss fyri fleiri vitjandi, sum nú er.

Men limir í FFT, og herbúgvandi tónleikarar annars, eru sum sagt vælkomin at senda uppskot til skrá.

**-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-**

**Partiturtónleikur:**

- ein týðandi partur av skránni til hvørja konsert skal innihalda tónleik, sum FFT-limir (verandi ella komandi) hava skrivað - í minsta lagið helvtin av konserttíðini eigur at vera tónleikur hjá FFT-limum.

- konsertskráin eigur ikki at vera longri enn 45 minuttir í alt.

**Fyrispurningar um luttøku mugu innihalda:**

- konsertskrá við upplýsingum um komponist, heiti & longd

- verk, sum ikki eru skrivað enn ("nýtt verk hjá NN") eru vælkomin

- listi við luttakandi tónleikarum ella bólkum

**-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-**

**Jazz/improvisatión/fólka:**

- ein týðandi partur av skránni til hvørja konsert skal innihalda tónleik, sum FFT-limir (verandi ella komandi) hava skrivað - í minsta lagið helvtin af konserttíðini eigur at vera tónleikur hjá FFT-limum.

- konsertskráin eigur ikki at vera longri enn 45 minuttir í alt. Øðrvísi tó til Club venues – á spælistøðum, har teirra siðvenja ræður.

**Fyrispurningar um luttøku mugu innihalda:**

- listi við luttakandi tónleikarum ella bólkum

- listi við komponistum/songwriters

- hugskot, sum enn ikki eru sett í verk eru vælkomin.

**-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-**

**Fígging:** Summartónar mugu fáa fígging til vega á hvørjum ári, byrjandi við 0 kr., og kann tí bert lova, at festivalurin søkir um stuðul generelt.

Sum meginreglu, fíggja Summartónar ikki ferðaútreiðslur úr útlondum hvørki hjá útisetum ella onnur.

**Freist: Send uppskot áðrenn 1. september til kristianb@tutl.com**

. Summartónar eru 1. juni – 31. august 2021